## Færri suðuroyingar

Fráflyting og vantandi burðaravlop eru orsøkin til, at fólkatalið minkar støðugt í Suðuroy. Á nýggjárinum búðu 4.943 fólk í oynni, og tað er tað minsta síðani í fyrru helvt av 1920-árunum, skrivar Suðuroyarportalurin. Síðani 1990 eru 322 fólk flutt úr Vágs kommunu, 280 úr Tvøroyrar kommunu, 96 úr Hvalbiar kommunu, 80 úr Sumbiar kommunu, og fráflytingin hevur eisini verið stór í hinum kommununum burtursæð frá Fámjin.

## Færri bilar

Ferðslan ígjøgnum Norðoyatunnilin er ikki so stór, sum tunnilsfelagið hevði roknað við. Upprunaliga varð mett, at 1.500 bilar fóru at koyra ígjøgnum tunnilin um samdøgrið, og frá 1. mai til 31. desember í fjør var talið eitt vet oman fyri metingina. Men samanborið við royndirnar frá Vágatunlinum høvdu millum 1.400 og 1.500 bilar koyrt ígjøgnum tunnilin um samdøgrið, roknað fyri alt árið. Norðoyatunnilin lat upp í apríl í fjør.

# EasyFisk leitar eftir í

**Brøðurnir, Stig og Sammi Isaksen, eiga fyritøkuna EasyFisk í Danmark. Hetta er ein føroysk fyritøka, sum selir føroyskan fisk til privat húski, matstovur og kantinur í Danmark. Viðskiftafólk gjalda fyri vøruna við gjaldskorti, og síðan verður fiskurin koyrdur til dyrnar eftir fastari koyriætlan. Nú leita menninir, sum standa aftanfyri fyritøkuna, eftir íleggjarum í Føroyum fyri at kunna veksa uppaftur meira um virksemið í Danmark**

EASYFISK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*- Vit kundu hugsað okkum at gjørt nógv meira við marknaðarføring fyri soleiðis at rokkið enn fleiri viðskiftafólkum í Danmark. Men marknaðarføring kostar pening, og tí ynskja vit nýggjar íleggjarar í Føroyum, sigur Sammi Isaksen*

Føroyska fyritøkan í Danmark, EasyFisk, leitar nú eftir nýggjum íleggjarum, sum kunnu verða við til at veksa um virksemið hjá fyritøkuni.

Virksemið hjá felagnum byrjaði í oktober 2005 og teir báðir, sum standa aftanfyri EasyFisk, siga, at gongdin higartil hevur verið á einari leið.

- Jú, tað hevur gingið hampiliga væl, sigur Sammi Isaksen, sum er annar av monnunum.

Easyfisk hevur gjørt eitt stórt arbeiði fyri at økja um talið av viðskiftafólki, og í dag hevur felagið eini 1000 skrásett viðskiftafólk, sum regluliga keypa føroyskan fisk.

- Sølan fyri hvørt viðskiftafólk - ella fyri hvørja bílegging - liggur um 500 krónur í miðal, sigur Sammi Isaksen.

### Íleggjarar vælkomnir

Øll byrjan er vanliga tung, og fíggjarliga hevur EasyFisk klárað seg við einum minni rakstrarláni frá Nordea Bankanum og einum sonevndum "kom-i-gang-láni", sum danski Vækstfonden hevur latið. Hetta er ein grunnur, sum stuðlar nýggjum íverksetarum í Danmark.

Sammi Isaksen sigur, at í dag er javnvág við at koma í inntøkur og útreiðslur hjá felagnum, og hann heldur, at um neyðugur kapitalur fæst til vega, hevur EasyFisk góðar møguleikar at økja munandi um søluna tey komandi árini.

- Vit kundu hugsað okkum at gjørt nógv meira við marknaðarføring fyri soleiðis at rokkið enn fleiri viðskiftafólkum. Men marknaðarføring kostar pening, leggur hann aftrat.

Hann dylir tí ikki fyri, at møguligir íleggjarar í Føroyum - og millum føroyingar í Danmark - eru meira enn vælkomnir at stuðla fyritøkuni, soleiðis at EasyFisk veruliga kann gera seg galdandi á danska marknaðinum.

### Á heimasíðu

Sammi Isaksen sigur, at danir eru farnir at eta nógv meira fisk seinastu árini, men samstundis gongur ikki so væl hjá teimum at fáa dygdargóðan fisk.

- Vit hoyra í heilum frá okkara viðskiftafólkum, hvussu góður tann føroyski fiskurin er.

Hann ivast onga løtu í, at vakstrarmøguleikarnir hjá EasyFisk eru stórir, um felagið fær møguleikan at gera meira við marknaðarføring.

- Tí hevði tað verið ógvuliga kærkomið, um vit fingu nakrar áhugaðar íleggjarar, leggur hann aftrat.

EasyFisk hevur heimasíðuna www.esyfisk.dk

- Fólk og fyritøkur eru soleiðis meira enn vælkomin at seta seg í samband við okkum, um áhugi er fyri at verða við til at styrkja fyritøkuna, sigur Sammi Isaksen.

Adressan hjá EasyFisk í Danmark er Amager Landevej 96c,2.tv. 2770 Kastrup

### Føroyskur línufiskur

3 kilo av føroyskum línufiski, sum er pakkaður í 500 gr. eskjur.

Tað er luksuspakkin, ið danir og føroyskir útisetar kunnu keypa á heimasíðuni hjá EasyFisk, og longu vikuna eftir liggur pakkin á gáttini.

Fiskurin, sum menninir aftanfyri fyritøkuna í Danmark bjóða, er eitt nú føroyskur kalvi, toskur, reyðsprøka, hummari og annað, sum upp úr havinum kemur.

Teir selja bæði til privat viðskiftafólk, matstovur og kantinur um alt Danmark.

Sammi Isaksen er teldumaður, sum hevur lisið HA,